# ítróttur

Nr. 120 • hósdagur • 27. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Nú er at ansa sær!



*Bengt Saltin frá Anti Doping Danmark ivast ikki í, at avtalan, sum nú er undirskrivað, kann verða til stórt gagn fyri føroyskan ítrótt*

**Føroysk ítróttafólk kunnu í framtíðini vænta sær ófráboðaða vitjan av dopingserfrøðingum. Eini 15-20 royndir skulu takast árliga**

DOPING
*Páll Holm Johannesen*

Týsmorgunin varð so endaliga dopingavtaluna millum ÍSF og Anti Doping Danmark undirskrivað. Í samband við samstarvsavtaluna var formaðurin í Anti Doping Danmark, Bengt Saltin, komin upp til Føroya at greiða frá virkseminum hjá felagnum. Formaðurin væntaði, at avtalan fór at hjálpa føroyingum at koma ígongd við dopingkanningum og dopingfyribyrging.

Formaðurin í ÍSF, Heðin Mortensen, segði við Útvarpið, at hetta var ein stórur dagur fyri ítróttina, nú avtalan var komin undir land. Hann legði eisini dent á, at samstarvsavtalan er liður í eini menning, sum skal tryggja føroyingum neyðuga førleikan til sjálvir at standa fyri kanningunum í framtíðini.

### 15-20 royndir um árið

Ætlanin er, at fólk úr Danmark skulu koma til Føroya tvær til tríggjar ferðir árliga at taka royndir av føroyskum ítróttafólkum. Talan er um roynd fólk, ið hava serkunnleika á dopingøkinum.

Føroyingar kunnu vænta sær, at eini 15-20 royndir verða tiknar um árið. Serfrøðingarnir hava rætt til bæði at koma til venjingarnar og tá ítróttafólkið dystast. Verður persónur tikin og noktar at luttaka í dopingroyndini, verður dopingroyndin tulkað sum positiv.

Viðurskiftini millum tann innkallaða og dopingfólkini fara fram í fullum trúnaði. Báðir partar skulu undirskriva avtalu um tagnarskyldu, so personliga trygdin verður varðveitt Tann innkallaði verður ikki viðgjørdur eftir navni, men fær eitt journalnummar.

Eftir dopingroyndina verða úrslitini send til Noregs, har tey á kanningarstøð verða viðgjørd. Tá úrslitið av royndunum fyriliggur, fær ein eftirlitsnevnd í Føroyum tey. Eftirlitsnevndin útgreinar so úrslitini og avgerð, um víðari skal farast við málinum. Er eitt brot framt, verður dopingnevndini boða frá.

Dopingnevndin tekur so støðu til, hvussu dómurin ljóða. Kennir ítróttafólkið seg ikki rættvíst viðfarið, kann dómurin kærast til ein ítróttadómstól.

Eftirlitsnevndin, dopingnevndin og ítróttadómstólin hevur stjórnin hjá ÍSF mannað. Eftirlitsnevndin telur seks limir, og er mannað av læknum og farmaceutum. Dopingnevndina hevur ÍSF mannað við juristum og læknum. Fólkini, ið eru sett í Ítróttadómstólin, hava øll løgfrøðisliga bakgrund.

### Vilja ikki spæla politi

Heðin Mortensen, formaður í ÍSF, sigur, at ÍSF við nýggju samstarvsavtaluni ongar ætlanir hevur um at spæla politi hjá ítróttafólkunum. Hann vísir á, at endamálið er at kunna um vandan av doping og at tryggja, at fyribyrgingararbeiðið verður so væl úr hondum greitt sum gjørligt.

– Vit ætla okkum at umseta faldarar um doping og tann vegin koma inn á skúlarnar, sigur Heðin Mortensen. Ítróttafeløgini kunnu eisini vænta sær vitjan, tí stendur tað upp til Heðin Mortensen, so skulu ungdómsvenjarar kring landið kunnast um dopingvandan. Heðin Mortensen vónar, at man fangar varhugan hjá børnunum við doping á ungum aldri, og at skúlarnir og ítróttafeløgini fara at gera sítt til við kunningararbeiðinum.

# Allar ítróttagreinar raktar

**Onki ítróttafólk skal kenna seg tryggan, og longu í ár verða dopingkanningar gjørdar**

DOPING
*Páll Holm Johannesen*

Tað verða ongin undantøk, nú donsk dopingfólk fara runt landið at vitja føroysk ítróttafeløg. Alt frá golf til fótbólt kann vænta sær vitjan, bæði undir venjing og til dyst.

Framferðarhátturin verður meinlíkur tí, ið vit kenna frá øðrum norðanlondum. Í norðanlondum fer man heilt niður í 3-4 deild í teimum ymisku ítróttargreinunum og ger kanningar. Um hetta eisini verður framferðarhátturin í Føroyum, sigur Heðin Mortensen, formaður í ÍSF, at ætlanin er at fylgja teimum norðurlendsku lógunum, og, at ongin skal kenna seg heilt tryggan. Heðin Mortensen sigur víðari, at allar dopingkanningarnar vera ófráboðaðar og lagt verður til brots longu í ár.



# Sverri kom, sá og sigraði

**Sundalagsstevnan var í vikuskiftinum, og fyri triðju ferð í hesum kappingarárinum stóð Grand Prix súkkling á skránni. Sverri M. Edvinsson hevði ein góðan dag og koyrdi ein tryggan sigur heim**

SÚKKLING
*Tíðindaskriv*

Sundalagsstevnan var hildin í Hósvík í ár, og tí avgjørdi Tórshavnar Súkklufelag at koyrast skuldi einkultstart. Tá koyrt verður einkultstart fer ein og ein súkklari avstað, og sum oftast er ein minuttur millum hvønn súkklara. Súkklarin hevur onki at meta seg eftir og koyrir í fyrstu siftu kapp ímóti klokkuni. Vinnarin er tann, ið hevur koyrt teinin skjótast.

Koyrt bleiv frá Hósvík, gjøgnum Norðskála til Ljósáir har vent bleiv. Leiðin gekk so sama veg aftur til Hósvíkar. Teinurin er rættiliga góður til einkultstart og teinurin mátaði 35,1 km.



*Sverri Mohr Edvinsson var sera væl fyri á sundalagsstevnuni og vann ein greiðan sigur í einkultstartinum*
*Mynd: Gunnar Dahl-Olsen*

### Sverri til dystin fúsur

Tað var ein væl upplagdur Sverri sum setti seg á súkkluna leygardagin kl. 12. Hann traðkaði væl á pedalurnar - koyrdi í einum passaliga tungum geari - og megnaði tí at koyra við einari góðari ferð allan samlan vegin. So væl gekk, at tá hann kom á mál vísti meðalferðin 38,2 km/t, og er hetta eitt rættiliga gott úrslit á einum so langum teini.

Sigurin hjá Sverra var tí tryggur og vann hann við umleið 2 minuttum á nr. 2, sum gjørdist Eli Christiansen.

Eli koyrdi eisini væl í góðveðrinum leygardagin. Silvurið leygardagin var triðja silvurið sum Eli hevur ognað sær í Grand Prix kappingingunum higartil, og liggur hann nú á odda við 102 stigum.

Bronsuna fór Esmar Joensen við, og hann súkklaði teinin uppá 58 minuttir. Við triðja plássinum tryggjaði Esmar sær 30 stig og liggur hann nú samanlagt á einum deildum 2. plássi saman við Gunnar Dahl-Olsen. Báðir hava teir 80 stig.

### Børnini koyrdu eisini einkultstart

Teir yngru súkklararnir koyrdu eisini einkultstart, men var teinurin væl styttri enn hjá teimum vaksnu súkklarunum.

Teinurin var stuttur, men sanniliga var hann tungur fyri luttakararnar. Koyrt bleiv frá vendiplássinum hjá bussleiðini og langt niðan í bygdina - til norðasta rulluportrið - og oman á mál aftur. Teinurin var umleið 1,5 kilometur.

Aftur hesa ferð gekk væl hjá Hans Krosstein og enn eina ferð vann hann ein tryggan sigur í bólkinum 12 til 14 ár.

Í bólkinum 9 til 11 ár mátti vinnarin á Eystanstevnu taka til takkar við einum 2. plássi eftir at Finnur Mellemgaard fór við sigrinum. Tætt var tó millum Finnur og Rana, men munin átti Finnur sum vann við trimum sekundum.

Kappast verður longu aftur á Jóansøku, og tá stendur Býarkoyring á skránni. Koyrt verður millum annað á tiltiknu Krosslábrekkuni.

Børn og ung sleppa eisini at royna seg. Telmelding verður á staðnum, og lýst verður í Jóansøkuskránni nær kappingin byrjar.

# Súkkluúrslit

**Úrslit frá kappsúkklingini á sundalagsstevnuni**

**Menn**

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1. | Sverri M. Edvinsson | 55.05 |
| 2. | Eli Christiansen | 56.57 |
| 3. | Esmar Joensen | 58.00 |
| 4. | Beinir Rasmussen | 58.17 |
| 5. | Kári Simonsen | 1.00.13 |
| 6. | Geyr Gilsteinsson | 1.11.47 |

**Unglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Dánjal Michealsen | 1.08.42 |

**Dreingir 12 til 14 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Hans Krosstein | 3.08 |
| 2. | Bergur Johansen | 3.32 |
| 3. | Rúni Bláfoss | 3.58 |
| 4. | Torkil Weyhe | 3.59 |
| 5. | John Mortensen | 4.30 |

**Dreingir 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Finnur Mellemgaard | 4.10 |
| 2. | Rani G. Jacobsen | 4.14 |
| 3. | Niels Christiansen | 4.27 |
| 4. | Magnus Joensen | 4.41 |
| 5. | Atli Carlsson | 4.47 |
| 6. | Pætur Unasson | 6.54 |

**Dreingir 6 til 8 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Áki Olsen | 5.24 |

**Gentur 9 til 11 ár:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Sára Olsen | 4.39 |

# B36 vann grannauppgerðina

**Sigurin á HB hevði við sær, at B36-kvinnurnar enda á øðrum plássi í kvinnudeildini , og fáa 2 stig við í endaspælið**

KVINNUFÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Í einum ikki serliga vælleiktum dysti týskvøldið millum havnarfeløgini B36 og HB, vann B36 2-1, eftir hálvleiksstøðuna 1-1. Nakað av vindi var í Gundadali, og hetta darvaði spælinum nakað, og liðini bæði høvdu torført við at fáa flótandi spælið at koyra,

Í fyrra hálvleiki leikti javnt á, og møguleikar vóru á bæði mál. Miðskeiðis í fyrra hálvleiki gjørdist Súsanna Hansen leys við HB-málverjanum, men HB-málverjin, Randi Wardum, bjargaði meistaraliga. Løtu seinni lá betur fyri hjá Súsonnu, rangstøðufellan hjá HB-verjuni miseydnaðist, og Ása á Neystabø streyk avstað, og ósjálvsøkin legði bóltin fyri føturnar á Súsonnu, ið ótarnað kundi seta bóltin í netið.



*B36-kvinnurnar vunnu á grannunum úr HB í nógva vindinum týskvøldið*

### HB svarar aftur

Ikki gekk long tíð, áðrenn HB-kvinnurnar svaraðu aftur. Fáar minuttir eftir B36-leiðsluna eydnaðist tað Ásu úr Dímun at javna. Eyðfríð Kristiansen brýtur ígjøgnum í vinstra borði og leggur innfyri, har Ása úr Dímun í tveimum umførum at fáa bóltin handan B36 málverjan. Javnleikur varð eisini hálveiksstøðan.

Ikki var seinni hálvleikur meir enn byrjaður, so lá bólturin aftur í HB-málinum. B36 vinnur sær hornaspark, ið Arnbjørg Danielsen skjýtur. Eftir eitt hálvkiksað hornaspark, kemur bólturin útaftur til Arnbjørg, ið leggur innfyri enn einaferð, har Selma Erol setur høvdið á til eina 2-1 leiðslu. Eftir málið hevði HB ringt við at fóta sær, tó so, at tær onkra hendingaferð lógu framvið at javna. B36 hevði eisini nøkur skot á HB málið í seinna hálvleiki, tó uttan, at nakað spurdist burturúr.

Við sigrinum á HB endar B36-kvinnurnar á øðrum plássi, og fáa tvey stig við í endaspælið, meðan HB-kvinnurnar enda á tridja plássi, og fáa eitt stig við sær í endaspælið.

**B36-HB 2-1 (1-1)**

1-0 Súsanna Hansen
1-1 Ása úr Dímum
2-1 Selma Erol

# Týskarar í HM-finaluni

**Fáur hevði væntað at sæð týskarnar í finaluni um heimsmeistaheitið, men hetta er nú ein veruleiki. Finalan verður tó uttan stórspælaran Michael Ballack.**

HM FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

So hendi tað aftur, uttan at hava spælt serliga sannførandi, hevur Týskland vunnið seg fram til HM-finaluna sunnudagin. Týsdagin spældu teir hálvfinalu móti verttjóðini, Korea, og vunnu við einum máli ímóti ongum. Dysturin var ikki serliga væl leiktur og langt var ímillum málmøguleikarnar. Tað eyðnaðist tó týskarnum at skora, tá miðvallarin Michael Ballack í 75. minutti fekk bóltin framvið koreanska málverjanum. Liðfelagin í Leverkusen, Oliver Neuville, stóð fyri uppspælinum, tá hann breyt ígjøgnum í høgra borið og legði innfyri til ein fríðan Ballack. Korea royndi at trýsta týskaranr seinastu minuttirnar, men týskarnir hildu skansan, og eru nú í finaluni á fimta sinni.

### Ballack ikki við í finaluni

Týski málskjýttin Michael Ballack, ið skiftir til Bayern Munchen eftir HM, verður ikki at síggja á vøllinum sunnudagin. Í dystinum ímóti Korea fekk hann sítt næsta gula kort í kappingini, og er sostatt leikbannaður. Ballack, ið hevur stóran týðning fyri týska liðið, var sjálvsagt vónbrótin, men fegnaðist um, at liðið hevði spælt seg í finaluna. – Hetta er ein stórur sigur fyri týsku fótbóltstjóðina, segði Ballack eftir dystin.